# Umhvørvisgóðkenning

| | |
|---|---|
| Navn á virki við góðkenning: **24.04.2023 P/F** | |
| Bústaður hjá virki: Garðabrekka 4, 510 Gøta | |
| Galdandi fyri virksemi: Útbygging av havnarlagi Undir Gøtueiði | |
| Matr. nr.: 334b í Syðrugøtu | V-tal: 664502 |
| Mál nr.: 24/14700 | Galdandi frá: 26-07-2024 |

Umhvørvisstovan, hin 26.07.2024

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

/

Rúna Hjelm, umhvørvisviðgeri

Innihald


1 Góðkenning og heimild ... 3
2 Umsókn ... 3
3 Lýsing av virkseminum ... 5
4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ... 7
5 Málsviðgerð ... 7
5.1 Grundarlagið undir málsviðgerðini ... 7
5.2 Hoyring ... 8
6 Góðkenningartreytir ... 8
6.1 Almennar treytir ... 8
6.2 Innrætting og rakstur ... 9
6.3 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ... 10
6.4 Burturkast ... 10
6.5 Rakstrarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing ... 11
7 Kæruvegleiðing ... 11

# 1 Góðkenning og heimild

Umhvørvisgóðkenningin av virkseminum hjá 24.04.2023 P/F at gera nýtt havnarlag á matr. nr. 334b í Syðrugøtu er givin við heimild í §§ 28 og 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

Í gróti, sum verður brúkt til at fylla út á sjógv, eru ofta leivdir av spreingileidningum, sum verða brúktir, tá grótið verður sprongt í einum grótbroti, tunli ella aðrastaðni. Tá sprongt grót verður koyrt á sjógv, flotnar plastið upp. Tað er staðfest, at slíkt plast rekur upp á land, serliga nærhendis virksemi, har sprongt grót verður fylt út á sjógv. Umhvørvisstovan metir tó, at bert ein lítil partur rekur upp á land, meðan størsti parturin verður verandi í sjónum. Mett verður, at grót frá tunlum hevur lutfalsliga nógvar leivdir av plasti, og metir Umhvørvisstovan, at tað kann hava týðandi dálking við sær, tá slíkt grót verður fylt út á sjógv.

Virksemi at fylla grót út á sjógv er ikki nevnt í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina yvir virki og virksemi, sum skal hava umhvørvisgóðkenning. Men av tí, at plast á sjónum er ein týðandi umhvørvisligur trupulleiki, hevur Umhvørvisstovan sambært § 28 í umhvørvisverndarlógini tikið avgerð um, at útfyllingar á sjógv við gróti, sum hevur týðandi nøgd av plastleivdum í sær, skulu hava umhvørvisgóðkenning.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi, og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Góðkenningin fevnir um arbeiðið hjá 24.04.2023 P/F og møguligum undirveitarum at byggja havnarlagið Undir Gøtueiði, so leingi arbeiðið við bryggjuni varir.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Góðkenningin fevnir um arbeiðið hjá 24.04.2023 P/F og møguligum undirveitarum at byggja nýtt havnarlag undir Gøtueiði, so leingi byggiarbeiðið varir.

Góðkenningin er grundað á upplýsingar frá 24.04.2023 P/F og ráðgevum teirra. Tað er ábyrgdin hjá 24.04.2023 P/F, at upplýsingarnar, sum eru latnar Umhvørvisstovuni, eru rættar.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 2 Umsókn

Ráðgevin hjá 24.04.2023 P/F vendi sær 6. juni 2024 til Umhvørvisstovuna við upplýsingum um, at 24.04.2023 P/F, sum er dótturfelag hjá P/F Varðanum, hevur ætlanir um saman við Eysturkommunu at fara undir eina nýggja havnarverkætlan norðan fyri bygdina Undir Gøtueiði. Økið, har nýggja kaiin verður staðsett, er frámatrikulerað í tveir matriklar í Syðrugøtu. Matrikul 334b er økið hjá 24.04.2023 P/F, og matrikul 334c er økið hjá Eysturkommunu (sí mynd 1 á s. 4).




**Mynd 1.** Staðseting av nýggjum havnarøki norðanfyri bygdirnar Undir Gøtueiði og Skipanes

Ætlanin hjá 24.04.2023 P/F er at gera spunskai til vinnuvirksemi og frystitunlar. Eysturkommuna skal gera spunskai. Roknast kann við, at upp til 30 % av samlaðu víddini á havnarlagnum verða brúkt til bygningar.

Upplýst verður, at P/F Varðin, sum samstarvar við 24.04.2023 P/F, manglar atløgupláss til skipini, og pláss til atknýtt virksemi. Sum er, verða trol og onnur útgerð løgd á goymslu í gomlum grótbrotum og aðrastaðni, har pláss er fyri tí. Eisini manglar Varðin frysti- og goymslupláss. Frystigoymslan hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri er ov lítil, og tí verður stórur partur av frysta fiskinum fluttur til goymslur í Evropa, áðrenn hann verður seldur.



**Mynd 2.** Yvirlitsmynd av verkætlanini hjá 24.04.2023 P/F og Eysturkommunu

Orsakað av krøvum frá keyparum, verður stórur partur av frysta fiskinum fluttur aftur til Føroya, áðrenn hann verður seldur víðari. Tá verkætlanin er liðug, sleppur Varðin stórt sæð undan at flyta fiskin til goymslur í Evropa.

Eysturkommunu vantar vinnuøki, og hevur hon tørv á atløgusíðu og kaiplássi til vinnuna í kommununi. Verandi kaiøkið í Norðragøtu kann ikki víðkast, uttan at størri íløgur verða gjørdar í nýggjan pir.

# 3 Lýsing av virkseminum

Ætlanin hjá 24.04.2023 P/F og Eysturkommunu snýr seg um at byggja tilsamans 30.000 m$^2$ stóra atløgubryggju norðanfyri bygdina Undir Gøtueiði. Bygt verður soleiðis, at býtið millum matrikul 334b og 334c í Syðrugøtu er 15.000 m$^2$ av havnarøki á hvørjum matrikli (sí mynd 2 á s. 3).




**Mynd 3.** Prinsipptvørskurður av bryggjuni Undir Gøtueiði

Kaiin verður gjørd sum spunskai við betonghamara, og dýpið fram við kaikantinum verður 12-15 m (sí mynd 3). Umleið 230.000 m3 av gróti skal til fyri at gera bryggjuna. Grótið fæst á staðnum í sambandi við gerð av frystitunlum hjá 24.04.2023 P/F. Roknað verður við, at grótið frá frystitunlunum inniheldur spreingi-traðrir (Nonel).

Sambært upplýsingum frá Eysturkommunu liggur havnarøkið norðanfyri bygdina Undir Gøtueiði í øki D, sum er havnarøki í byggisamtyktini fyri Eysturkommunu[1].

[1] Leinki til byggisamtykt hjá Eysturkommunmu: https://alment.kort.fo/kort/eystur.html




**Mynd 4**. Tekning av flótisperru, ið skal forða fyri, at plast sleppur út í umhvørvið

Í Umhvørvisárinsmetingini, dagfest 6. juni 2024, verður eitt nú kunnað um átøk, ið ætlanin er at gera, fyri at forða fyri, at Nonel-spreingileiðingar skulu spjaðast í umhvørvinum.

Fyri at forða fyri dálking av plasti, verður sperra løgd út um økið, har útvasking er frá fylluni. KJ Hydraulik hevur ment eina skipan í sambandi við ætlaðu útfyllingina á Gomlurætt (sí mynd 4 og 5). Ætlanin er at brúka hesa loysnina sum sperru, meðan útfyllingararbeiði verður gjørt.




**Mynd 5.** Mynd av plastsperru við innsiglingarrennu

# 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

24.04.2023 P/F hevur upplýst, at grótið til verkætlanina kemur úr frystitunlum Undir Gøtueiði, sum felagið hevur ætlanir um at gera. Ætlanin er at spreingja tunlarnar, og grótið fer væntandi at innihalda Nonel-spreingileivdir, t.e. plasttræðrir, sum losna frá grótinum, tá grót verður vippað á sjógv.

Plast í havinum er ein týðandi og vaksandi umhvørvisligur trupulleiki um allan heim. Tað er tí umráðandi at avmarka nøgdina av plasti, sum fer á sjógv, mest møguligt. Bryggjan verður gjørd sum ein sokallað spunskai, har grót verður fylt innan fyri ein spunsvegg. Ein partur av grótinum verður tó fyltur út, áðrenn spunsveggurin verður settur upp. Roknast kann við, at meginparturin av plastinum, sum verður fyltur innan fyri spunsveggin, verður innanfyri. Umhvørvisstovan setir kortini krav um, at 24.04.2023 P/F leggur forðing út, so at plast verður hildið aftur. Treytir verða tí settar um, at felagið ger eina meting av útlátinum av plasti frá verkætlanini, og hvussu ein forðing á bestan hátt kann fyribyrgja, at plast rekur frá útfyllingini. Eisini verður treyt sett um, at forðingin skal røkjast, og at leivdir av spreingileidningum regluliga verða tiknar upp úr forðingini og kring fjørðin.

Arbeiðið at flyta grót til útfyllingina við lastbilum og gravimaskinum kann hava nakað av óljóði við sær. Treytir vera tí settar um óljóð og ristingar. Av tí at talan er um eina tíðaravmarkaða verkætlan, metir Umhvørvisstovan, at tað í hesum føri kann vera vikið nakað frá vanligu krøvunum til óljóð, og hevur stovnurin valt at taka støði í norsku leiðbeiningini *Retningslinie for behandling af støy i arealplanlegging*[2].

Nakað av burturkasti stendst av virkseminum, og krøv verða sett um, at verkætlanin hevur skipan til burturkast.

# 5 Málsviðgerð

## 5.1 Grundarlagið undir málsviðgerðini

Í viðgerðini av umsóknini, og til at áseta treytir, er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn frá 24.04.2023 P/F um umhvørvisgóðkenning frá 06.06.2024, og annað samskifti í hesum sambandi.
- Tilfar frá Moss havn - Kartlegging av plastforurensning i forbindelse med utfylling i sjø, Rambøll Norge 2016
- Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging (T-1442/2021)[1]

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at 24.04.2023 P/F leggur virksemið til rættis á ein hátt, so at umhvørvið verður ávirkað minst møguligt,

[2] Leinki til Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging (T-(1442/2021): https://www.regjeringen.no/no/dokumenter/retningslinje-for-behandling-av-stoy-i-arealplanlegging/id2857574/

- at avmarka útlát av plasti so nógv sum gjørligt,
- at avmarka ampar av óljóði og ristingum so nógv sum gjørligt,
- at avmarka útlát av dálkandi evnum, evju og dusti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt,
- at mannagongdir fyri at fyribyrgja dálkandi óhappum skulu vera tøkar,
- at útgerð til handfaring av dálkandi óhappum skal vera tøk og
- at Eysturkommuna og 24.04.2023 P/F hava serstakar góðkenningar knýttar til hvør sítt matr. nr.

  Góðkenningin hjá 24.04.2023 P/F er knýtt at matr.nr. 334b.

### 5.2 Hoyring

24.04.2023 P/F og Eysturkommuna fingu uppskot til umhvørvisgóðkenning til hoyringar tann 1. juli 2024. Umhvørvisstovan fekk hoyringarsvar 12. juli 2024 frá báðum hoyringarpørtum. 24.04.2023 P/F hevði ongar viðmerkingar, meðan Eysturkommuna hevði nakrar viðmerkingar um viðurskifti, sum nú er rættað.

## 6 Góðkenningartreytir

### 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á økinum, har virksemið fer fram, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

6.1.2 Allar treytir í hesi góðkenning eru eisini galdandi fyri virksemið hjá undirveitarum hjá 24.04.2023 P/F, meðan arbeitt verður við oman fyri lýstu verkætlan. Tað er 24.04.2023 P/F, ið hevur ábyrgdina av, at undirveitarar hjá felagnum halda treytirnar í hesi góðkenning.

6.1.3 24.04.2023 P/F rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

6.1.4 Virksemið má ikki víðkast, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa broyting.

6.1.5 Um virksemið steðgar fyribils, skulu tilfar og útgerð antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið, ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja, at olja, kemikaliir ella annað ikki kunnu verða til ampa, ella kunna dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

6.1.6 Heldur virksemið uppat, skulu alt tilfar og útgerð beinast burtur.

6.1.7 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini. Møgulig eftirlitsboð verða bara givin til 24.04.2023 P/F uttan mun til, um tey fevna um viðurskifti hjá 24.04.2023 P/F ella undirveitara.

6.1.8 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin
- dálkingin á aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir ella
- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast, tá góðkenningin varð givin.

6.1.9 Umhvørvisgóðkenningin er galdandi, til arbeiðið við at gera útfyllingina er liðugt.

6.1.10 Um arbeiðið ikki er liðugt, tá 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um minni dálkandi framleiðsluhættir ella betri reinsingarhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Økini, sum henda góðkenning viðvíkir, skulu rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skal gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.2.3 Høvuðsreglan er, at tað er bannað at koyra grót á sjógv, sum er dálkað við plasti ella øðrum dálkandi evnum.

6.2.4 Tað verður álagt 24.04.2023 P/F at nýta forðing til uppsamling av Nonel leidningsleivdum, og skal felagið áðrenn arbeiðið byrjar gera eina greiða og grundgivna ætlan fyri, hvørja og hvussu stóra forðing ætlanin er at brúka, og hvussu hon tryggjar, at Nonel leidningsleivdir v.m. ikki reka burtur, og hvussu plastleivdir innan fyri forðingina verða tiknar upp.

6.2.5 24.04.2023 P/F skal tryggja, at Nonel leidningsleivdir v.m., sum verða hildnar aftur innan fyri forðingina, dagliga verða savnaðar, og vektin skrásett. Um felagið ynskir at minka um títtleikan at savna leidningsleivdir inn, skal hetta verða tí felagið kann skjalfesta, at tørvurin ikki er so stórur. Broytingin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.2.6 24.04.2023 P/F skal regluliga fylgja við, tó í minsta lagi tvær ferðir um vikuna, meðan arbeiðið fer fram, og upp til ein mánað eftir, at arbeiðið er liðugt, um Nonel leidningsleivdir v.m. reka upp á land. 24.04.2023 P/F skal savna og burturbeina hesar til móttakara av burturkasti, og skráseta nøgdina av hesum í hóskandi vekteind.

6.2.7 24.04.2023 P/F skal skjótast gjørligt kunna Umhvørvisstovuna um óvanlig viðurskifti, sum hava við sær, ella kunnu føra til, týðandi dálking.

6.2.8 24.04.2023 P/F sendir Umhvørvisstovuni tíðarætlan og mannagongdir viðvíkjandi punktunum 6.2.3 til 6.2.7 í so góðari tíð, at møguligar broytingar kunnu gerast, áðrenn arbeiðið byrjar.

6.2.9 Um óhapp ella annað førir við sær, at forðingin ikki virkar sum ætlað, skal einki grót fyllast út, fyrr enn forðingin er komin í rættlag aftur.

6.2.10 Verður dálking staðfest av spreingileidningum í nærumhvørvinum, kann Umhvørvisstovan krevja, at 24.04.2023 P/F skipar fyri rudding.

## 6.3 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

6.3.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum.

6.3.2 Ískoytið frá virkseminum, sum henda góðkenning viðvíkir, og beinleiðis avleiddum virksemi til óljóðtyngdina við næsta grannamark, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk[3]:

| Bygningsslag | Krav um dagin (LpAeq12h 07-19) | Krav um kvøldið (LpAeq4h 19-23) ella sunnu-/halgidagar (LpAeq16h 07-23) | Óljóð um náttina (LpAeq,8h 23-07) |
|---|---|---|---|
| Bústaðir, frítíðarhús, sjúkrahús, røktarheim | 60 dB | 55 dB | 45 dB |
| Skúlar, barnagarðar | 55 dB meðan stovnarnir er í brúki | | |

Óljóðtyngdin: Ljóð, mált sum tað orkujavnaða, A-vigaða ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark.
LpAeq12h 07-19 merkir: miðal orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) í 12 tímar millum kl. 07-19.
Tilsvarandi hinar styttingarnar.

6.3.3 Um 24.04.2023 P/F metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 6 vikur, men styttri enn til og við 26 vikur, verða krøvini í 6.3.2 herd við 3 dB.

6.3.4 Um 24.04.2023 P/F metir, at óljóðið fer at ávirka sama grannalag samanhangandi í meira enn 26 vikur, verða krøvini í 6.3.2 herd við 5 dB.

6.3.5 Um tað eru týðilig impulsljóð ella týðiligir eyðkendir reinir tónar uppi í óljóðinum, kunnu krøvini í 6.3.2 verða herd við 5 dB. Impulsljóð kann stava frá boring, hamring, høgging og øðrum sláivirksemi. Reinir tónar kunnu koma frá útgerð sum pumpum og viftum.

## 6.4 Burturkast

6.4.1 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

6.4.2 Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

6.4.3 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.

6.4.4 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum, tøttum øki.

6.4.5 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu verða sett og tryggjað soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

[3] Sí síðu 21 í Retningslinje for behandling av støy i arealplanlegging (T-1442/2021).

## 6.5 Rakstrarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

6.5.1 24.04.2023 P/F skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nøgd av gróti, sum er brúkt til verkætlanina, í $m^3$
- Nøgd av innsavnaðum Nonel leidningsleivdum v.m. og øðrum tilfari frá spreingiútgerð, ella annað tilsvarandi tilfar, býtt upp í innanfyri forðing ella tilsvarandi, uppi á landi og á ymsum støðum í Skálafirði.
- Eftirlitsmyndugleikin skal til eina og hvørja tíð kunna síggja rakstrarskrásetingarnar ella biðja um avrit av rakstrarskrásetingunum, sum skulu goymast í 5 ár.

6.5.2 24.04.2023 P/F skal í seinasta lagi 6 vikur eftir at arbeiðið er liðugt gera eina umhvørvisfrágreiðing við:

- Uppgerð av rakstrarskrásetingum og lyklatølum,
- frágreiðing um viðlíkahald og óhapp við umhvørvisligum árinum,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk

6.5.3 Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

# 7 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.